KEMILUX industri




*Sølumenninir Páll Kjærbo og Sámal Joensen vitja virkir og stovnar kring allar Føroyar*

# **Veitarin** – ein handil fyri øll

Á HJALLA ER VÆLÚTGJØRDI HANDILIN HJÁ KEMILUX, VEITARIN, SUM ER HEILDARVEITARI AV REINGERÐAREVNUM EINS OG PAKKITILFARI, PAKKIAMBOÐUM, MASKINUM OG ARBEIÐSKLÆÐUM

**Magnus Gunnarsson**

Konseptið við handlinum Veitaranum er at hava alt innan vask, reingerð og arbeiðsklæðir á einum staði.

Handilin er til bæði vinnu og privat húsarhald. Um tað er bilurin, sum skal reinsast og vaskast, ella tað er køkurin, kjallarin ella túnið – tað er líka mikið. Alt fæst hjá Veitaranum á Hjalla, har kundin eisini fær vegleiðing í at nýta reingerðarevnini á rættan hátt.

Í handlinum er so at siga alt at fáa, sum t.d. arbeiðshandskar, trygdarskógvar, hosur, jakkar, klútar, moppur, pappír og automatir til pappír. Og so sjálvandi sápu og reingerðarevni annars.Eisini hevur handilin eitt stórt úrval av arbeiðsklæðum eins og regnklæðum og stivlum.

Handilin nøktar allan reingerðartørv yvirhøvur – heilt frá grovreingerðing á skipsdekki og í maskinrúmum, til upp og niðurvask í heiminum. Eisini nøktar Veitarin tann serliga tørvin innan reingerð, sum eitt nú matvøruídnaðurin krevur. Handilin selur eisini pakkitilfar, pakkiamboð og annan útbúnað til vinnuna og ídnaðin.

*Handilin er opin mánadag til fríggjadag frá kl. 8.00-17.30.*

**Kemilux Industri**

**Stovnað:** 1965

**Stjóri:**
Debes Petersen

**Virkisøki:**
Framleiðsla, heilsøla og smásøla

**Deildir:** Kemilux Industri og Veitarin

**Vøruskrá:**
reingerðarevni, vaskievni, vaskiamboð, pakkitilfar, pappír, klæði og skógvar

**Adressa:**
Kemilux Industri
Mykinesgøta 1
100 Tórshavn.
Tel. 350830
www.kemilux.fo
Teldupostur:
kemilux@kemilux.com

Veitarin
Á Hjalla
188 Hoyvík
Tel. 350830
www.veitarin.fo



*Sápur frá Kemilux eru í flestu føroysku heimum*



*Skjót og góð avgreiðsla av privatum sum vinnukundum*



*Dygdar arbeiðsklæðir til øll endamál*